TING-HELLAN

# erarum játta og angra



vegna stórfyritøkuna United Fruit Company. Men slíkar kreftir – og eg eri ikki pasifistur – máttu setast upp ímóti, ja, um ikki liberalum fólkaræði, so einum vinstravendum – ikki einaræðismaka, bara vinstravendum.

»Við tað, at Che Guevara doyði í 1967, einans 39 ára gamal, fær hann ikki vart seg longur«, skrivaði Oddvør Johansen í Dimmalætting sum Tórbjørn Jacobsen gjørdist mentamálaráðharri. Í sama blaði finst Árni Dahl (ið sjálvur, sum útgevi av Fríu Føroyum, loyvdi Marionnu Debes Dahl í oktober 1987 at útumfarandi spilla út ein deyðan mann – ikki tí, tað kemur sum so ikki málinum við) at Sosialinum; hvussu blaðið hevur »hundbeitt« Torbjørn Jacobsen. »Útumfarandi«, men opinberiliga ikki »hundbítandi«, orðini hjá frú Dahl vóru annars hesi: »Hann kundi fyrr á døgum, tá hann hevði fingið eitt sindur upp í høvdið, og tárini funnu veg fram úr eygnakrókunum, halda kenslubornar røður um føðilandið«.

Jú men, frú Johansen, og hr. Dahl, fyri tann skuld, tað er væl bara gott at massamordarin doyði; tí tað keðiliga við massamordarum er jú hatta har við at teir drepa, at kalla, upp á gjøt. Sostatt kláraðu fleiri persónslív enn annars at verða gomul.

At, og eins og Oddvør Johansen opinberiliga er før fyri, kunna síggja tað »tragiska« í at ein massamordari undir liðini á Pol Pot og Pinochet verður bakbundin og skotin sum ein hundur er ikki bara ódámligt, men fúlt órogvandi moralur. Hann burdi, eins og Castro, sjálvandi, verið handtikin og – ikki sum ávirkaðir drápsmenn, ið hava koyrt á og dripið onnur ferðandi – noyddur at lívbjarga sær í einum hampakliva alt sítt lív. Og, hevði hetta verið – hevði Che ikki doyð, ja, ikki bara ungur, men høpisleyst – hevði hann heldur ikki verið eitt romantiskt ikon hjá ørkymlaðum ungdómi og tilkomnum fólki við ivasomum morali.

Og, tað kann væl vera at »barnaheimið hjá Che var tað, vit rópa kultiverað. Á bókahillunum stóðu uml. 3000 bøkur um evni sum arkitektur, matematikk og sálarfrøði, og millum tær føgru bókmentirnar taldust skald sum Baudelaires, og tann klæntrasligi og astmasjúki drongurin var slúkin eftir at lesa … .« Hon hevur so sanniliga gjørt sítt heimarbeiði, hevur hon, frú Johansen … »Baudelaires«, ádu, ádú! Spell, tó, at arbeiðið ikki fevndi um tær meira tollutu síðurnar av massamordaranum; eitt nú hevði myndamaðurin Rene Burri hetta at siga sunnudagsblaðnum The Observer um tilfallandi íkomuna av fyrsta Castro-stjórnarráðnum. 'One of Castro´s aides asked, »Is there an economist in the room?«, and, to everyone's surprise, Che stuck up his hand. Because they were all in awe of him, they voted him Governor of the National Bank. It turns out Che had misheard the question. He thought the guy had asked, »Is there a Communist in the room?«'

Vinstravend á mínum aldri er fyrsta ættarliðið á tí »síðuni« av girðingini í nærum eina øld verandi fullkomiliga ósmittað av sambandinum við kommunismuna. Tað ringasta tey kunna gera er at søpla henda møguleika og revalidera »hetjurnar« frá hasum ønskriliga, blóðblettaða tíðarskeiðinum.

Og jú, høgrasnarað synjan fyri alskyns ræðuleikum er eisini til … enn. Og eisini er tíðin hjá teimum komin at játta og angra: hygg hvussu ein órógvandi stórur partur av høgravonginum lovprísar general Pinochet, Sharon, saudiarábiska kongshúsið, Vatikanið og vanlukkuligu 'struktur- og stabiliserings'-ætlanina hjá einaferð so góða IMF; og, ikki at gloyma, lovprísaði Móðir Teresu. Men tað er eingin umbering; vinstravongurin sjálvur má koma við mátistokkinum.

Tað er freistandi at billa sær inn at lyndið hjá vinstravonginum at hyggja hin vegin, tá ið tað kemur til ræðuleikar, doyði við sovjettunum. Tað gjørdi tað ikki. Tvey dømi – og so endi eg … og úrskurð: í Commandante, nýligi heimildarfilminum eftir Oliver Stone, fylgist filmssmiðurin við gamla vinmanninum hjá Che, Fidel Castro – ein, eins og vit nú hava sannað, (spýggjuligur) einaræðisharri. Castro tosar við nakrar heilt fáar, týðiligani ræðslusligar, politiskar fangar; allir sjálvandi »undirvístir« til samrøðuna.

Tá ið so Stone, eitt sindur seinni, tosaði um júst handan tilburðin, segði hann: »Yeah, I thought that was funny, I did … There was that paternalism [red: faðirligheit]. I mean it was 'father knows best', as opposed to totalitarianism [red: einaræði]. It's paternalism, that's what I mean. It's a Latin thing«. Álvaratos! Hvussu andstyggiligt er hatta ikki; og hvussu nógv roynir hann ikki, í tragikomiskum vónloysi, at bera í bøtuflaka fyri Fidel. Nei, hatta var ikki ein spurningur, men staðfesting. Og, eins og fleiri ummælarir eisini líka nevndu burturúr: »Stone flenti – flenti – at einum gulag«. Og hevdaði – av avgjørt rasistiskum grundum – at »latínarir« dáma tað.

Og í Fahrenheit 9/11 lýsir Michael Moore Irak undir Saddam. Hann lýsir tað sum eitt 'suverent' land, har smábørn flúgva við dreka og gamlar konur 'jolla' sær. 'To i to' – tað er tað. Ein stórur partur av vinstravonginum, og ein ávísur partur av høgravonginum, var ímóti krígnum av fullkomiliga heiðurligum ávum – eg uppíroknaður, men samveldis-liberalistur. Tey flestu vóru væl vitandi um og játtaðu brotgerðirnar at mannaættini framdar av Hussein. Men vit muga líkaleiðis játta, at støkkurin, at áeggjanin hjá Moore, tað, sum fekk hann at skava út yvir ræðuleikarnar framdar av Saddam, er tann sama áeggjanin, ið fekk bróðurpartin av vinstravonginum at skava út yvir ræðuleikarnar framdar av kommunismuni?

Kundi Moore ikki verið ímóti krígnum og eisini játtað ta ræðuligu avleiðingina av tí valinum? Um tú ikki gert tað, um tú bert í bøtuflaka fyri Saddam, Castro, Pinochet, Che, Sharon o.s.fr., frásigur tú tær so ikki rættin at finnast at Bush og Blair – tó at hvørgan teirra kann sammetast við »teir listaðu«, bølmennini, og so sanniliga ikki tann síðstnevndi – og teirra óklóka átak í Irak?

Um vinstravongurin hevur lært nakað av 20. øld, íðan, so má tað vera tað at spýggjuligi atburðurin hjá teirra siðvenjuliga andstøðufólki ikki gevur vinstravonginum frælsi ella loyvi til at blíva líka spýggjuligur. Vinstravongurin kann ikki loyva sær at bera yvir við »sínum kúllum«; hann kann ikki skúgva fólkaræðisligar setningar til viks so at knúsa fólk, tey vinstravendu meta vera enntá verri.

Sum mannarættindi verða brotin og meira enn ein milliard medmenniskju eru svong og takleys, er ein alheimsligur vinstravongur, saman við einum – og vónandi størri – liberalum vongi, og høgravongi, meira enn nakrantíð neyðugur. Men tað má vera ein fólkaræðisligur vinstravongur. Sostatt er tíðin komin, har eisini Stalin-umberarir játta og angra … og lata Che Guevara og hansara kammerátar doyggja.

**»Sum mannarættindi verða brotin og meira enn ein milliard medmenniskju eru svong og takleys, er ein alheimsligur vinstravongur, saman við einum – og vónandi størri – liberalum vongi, og høgravongi, meira enn nakrantíð neyðugur. Men tað má vera ein fólkaræðisligur vinstravongur. Sostatt er tíðin komin, har eisini Stalin-umberarir játta og angra... og lata Che Guevara og hansara kammerátar doyggja."**

